# Konstruktivir fundir um almannaøkið

JOHN JOHANNESSEN
Form. Javnaðarfloksins á tingi



**Yvirskriftirnar í dag hava boðað frá, at Javnaðarflokkurin hevur hótt við at slíta samgonguna. Í meðan hevur Javnaðarflokkurin sitið saman við hinum samgonguflokkunum á konstruktivum fundum um neyðugar tillagingar, so sleppast kann undan, at sparingar raka tey veikastu í samfelagnum**

*Tíðindaskriv*

Tað er rætt, at Javnaðarflokkurin hevur biðið um at fingið broytt skránna fyri regluliga fríggjadagsfundin í lítlu samgongu, soleiðis at tað millum annað bar til at viðgera nakrar av sparingunum, sum eftir okkara tykki raka skeivt og tí ikki eiga at verða gjøgnumførdar.

Men støðan í samgonguni hevur ikki verið hættislig og neyðugt hevur ikki verið at hótt við at slíta samgongusamstarvið. Klandur og stríð er ikki vørumerkið hjá hesi samgonguni.

Tað er ongin loyna, at Javnaðarflokkurin hevur verið alt annað enn nøgdur við ætlaðu sparingarnar á almannaøkinum. Hetta hava vit viðgjørt leypandi í tingbólkinum alla vikuna – eisini saman við landsstýriskvinnuni á økinum og við ymiskum fakfólkum á økinum.

Tí heittu vit á hinar báðar flokkarnar í samgonguni, um at fáa ætlaðu skránna hjá lítlu samgongu ruddaða og í staðin at fáa hesi viðurskifti á dagsskrá. Hetta ynski varð beinan vegin og uttan trupulleikar eftirlíkað, og allan dag hava vit viðgjørt hetta evnið.

Tað er enn ikki komið endaliga á mál við arbeiðinum. Men tað er í dag greitt, at flokkarnir hava eina felags fatan av, hvørjir trupulleikarnir eru, ið krevja loysnir sum skjótast.

# Fegnast um EFTA leistin hjá Eidesgaard

JOHN JOHANNESSEN
Vegna Javnaðarflokkin



**Javnaðarflokkurin fegnast um, at leisturin, sum vit tóku stig til við einum EFTA-limaskapi, hesar seinastu dagarnar hevur fingið meira vind í seglini við serliga útsøgnunum hjá Ole Spiermann, professara, um EFTA-limaskapin og eina EBS-avtalu. Harumframt viðmerkingunum, sumPer Stig Møller, uttanríkisráðharri er komin við í hesum sambandi**

*Tíðindaskriv*

Javnaðarflokkurin hevur ikki beinleiðis verið partur av kjakinum um EFTA, EBS og ES seinastu dagarnar, men flokkurin fegnast tó um, at leisturin, sum vit valdu, tá Jóannes Eidesgaard umsat uttanríkismál sum løgmaður, nú tykist at fáa alt størri undirtøku.

Hetta kemst fyrst og fremst av, at Ole Spiermann, professari, rættiliga greitt hevur sagt, at EFTA-limaskapurin er ein veruleikakend leið at ganga, meðan ES-limaskapurin er tengdur at nøgvum trupulleikum, sum Javnaðarflokkurin eisini hevur verið greiður um alla tíðina.

Tað telur eisini nógv, at Spiermann sigur, at ein EBS-avtala sum fylgja av einum EFTA-limaskapi eisini er møgulig, soleiðis sum hann sær viðurskiftini. EBS merkir tey fýra frælsini innan vørur, tænastur, arbeiðsmegi og kapital við ES londini.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, avvísti avgjørt ikki sjónarmiðunum frá Spiermann, hóast danska stjórnini áður hevur havt tað sjónarmið, at EBS ikki var ein møguleiki.

Javnaðarflokkurin heldur, at kjakið seinastu dagarnar hevur svarað mongum spurningum, men eisini sett nýggjar. Tí er nú umráðandi at fáa serfrøðingabólkin, sum skal kanna EFTA, EBS og ES til verka.

# Fólk spyrja: "Hví skal sparast her og har"

HØGNI MIKKELSEN
Sambandsmaður



Tað er so sera einfalt, tá landskassin ikki hevur pening nokk til at húsast við, so er einasta loysn at skera niður í teimum almennu tænastum og teimum almennu íløgunum tíverri.

Í 2002 bleiv blokkurin skerdur við 365 mill. Krónum um árið, og tað var Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum stóðu á odda fyri hesari vanlukku.

Tað er ótrúligt at hoyra veljarnar hjá hesum somu flokkum grenja um, hví hetta og hatta skal sparast vekk í hesum tíðum. Ì Suðuroynni minkar fólkatalið, tí har er ov lítið arbeiði. Ì norðoyggjum er støðan ikki góð, nú arbeiðsplássini fækka, og sama skil er í øllum landinum - tað manglar peningur-

Eldraøki er í sorli. Fólk sleppa ikki á ellis- og røktarheim, tí einki pláss er fyri teimum, og peningur er ikki til, so at byggjast kunnu nýggj ellis- og røktarheim. Heilsuverkið má eisini spara, tí har mangla eisini pengar. Ja, eg kann blíva við, men lat fara.

Eg skilji ikki, at fólk, sum hava valt hesar nevndu flokkar, grenja um, hví ymisku økinia ikki verður raðfest øðrvísi, men tað er nú soleiðis, at øll raðfesta ikki eins.

Tíverri valdu tey flestu fólkini, at blokkurin skuldi skerast niður, tí er støðan sum hon er, og tað gongur út yvir okkum øll, eisini tey, ið ynsktu at varveita blokkin sum hann var.

# Skóleista-journalistikkur

VIRGAR T. DALSGAARD



Týsdagin tann 17. februar í ár hevði Dimmalætting á sjálvari forsíðuni eina rúgvismikla grein um eina hálvføroyska danska kvinnu, sum úttalar seg ógvuliga positivt um føroyskar skóleistar, og hvat teir hava havt at týða fyri hennara lívsleið!

Og ikki nóg mikið við tað – nei, tað verður víst til eina útdýpandi grein inni í blaðnum, har man í einum kronikki uppá samfullar tvær síður meira eksakt fær illustrerað tann lívstýðandi týdningin av fløvandi føroyskum skóleistum.

Hetta er sjálvandi ikki heilt óinteressant, men eiga slíkir tankar at vera forsíðu-tíðindi í einum seriøsum føroyskum blaði. Er hetta relevant forsíðutilfar?

Vit mugu gera okkum greitt, at hetta er um somu tíð sum lemjandi fíggjarligar sparingar verða debatteraðar dagliga á løgtingi. Hetta er eisini um somu tíð sum útlendsk bløð hvønn dag eru á tremur um álvarsom og skelkandi fíggjar-tíðindi úr allari verðini. Hetta er harafturat um tað mundið, tá ið europeiskir journalistar eru farnir at skriva sera kritiskt um kríggið í Afghanistan, sum Vesturheimsins herdeildir kanska koma at tapa! Átti slíkt tilfar ikki altíð at verið prioriterað langt framum skóleistar sum forsíðutíðindi?

Tað er at halda lesaran fyri tað turra spott, tá ið man noyðir hann til at halda slík anti-tíðindi vera forsíðu-relevant!

**Kvinnan firnast abstinensir**

Og so er tað sjálvur kronikkurin: Ja, har fáa vit m.a. at vita, at tann hálvføroyska kvinnan, sum er kendur danskur sjónleikari næstan er blivin "avhangig" av føroyskum skóleistum, sum ommusystir hennara hevur sent henni í áravís!

Her kann málið gerast ógvuliga álvarsamt, tí einhvør avhangigheit kann jú, sum kunnugt skapa hættisligar abstinensir. Hvussu tann hálvføroyska kvinnan klárar seg, tá ið skóleistarnir eru uppslitnir, og tann føroyska ommusystirin ikki hevur sent nýggja forsýning, ja, tað fáa vit púra einki at vita um frá tí annars serdeilis grundiga kronikørinum.

Í tí hendingaringa geingi, vit hava beint nú, tá ið hálkan og kavin gera um seg í øllum Kjøpinhavn, er tað ótrúligt, at dimmumenn ikki fáa fortalt skóleistakvinnuni um, hvussu væl føroyingar hava dugað at lofta sær í hálku við at smoyggja skóleistar uttaná skógvarnar sum skølingar. Her hava okkara beskednu dimmumenn gingið í alt for smáum skóm. Tí skølingar eru allarhelst eitt føroyskt uppfinnilsi! Men hetta kann kannast og granskast, eitt nú á Setrinum!

Fyri nøkrum fáum árum síðani vóru menn frá "Degi & viku" suðuri í Trongisvági og interviewaðu ein traðarmann við eini tvílembu, sum vist hevði tvílembt fyri aðru ferð sama árið. Tvílemban slapp at jarma einar tvær ferðir í mikrofonina afturvið tí sindrinum, sum traðarmaðurin visti at siga.

Tá trúðu vit ikki, at føroysk tíðindasending kundi gerast meira irrelevant, tápulig og óviðkomandi.

Men eftir at skølingar á Dimmalætting eru farnir at filosofera um skóleistaavhangiheit hjá hálvum útisetum, tykist tað sum um tann journalistiski idiotprísurin einaferð enn lættliga kann býtast út eftir tí allarminsta felagsnevnaranum!





**Betri stýring og rykkjan av skuldarum (debitorum)**

*- fáið útistandandi pening í hús*

**Senda tit hópin av rykkjarum?**
Er hetta ein tyngjandi ábyrgd, sum í ringasta føri kann føra við sær, at tit aldrin fáa peningin inn? So er hetta skeiðið helst nakað fyri tykkum.

Á skeiðnum fært tú íblástur til, hvussu tú á bestan hátt handfarir skuldarum líka frá fyrsta faktura verður send, til fyribyrgjan av tapi, til áminngarskriv, ómaksgjøld, rentur og innheintan.

Ofta er tað trupult at vera tann, sum við fremstafingri á lofti skal ringja til kundan fyri at minna hann á at gjalda. Tú fært eisini íblástur til, hvussu tú tryggjar eitt gott og javnbjóðis samskifti við kunda og varðveitir góða sambandi, soleiðis at kundin framvegis ynskir at verða kundi í fyritøkuni.

**Super góðar eftirmetingar**
Luttakarar hava givið hesum skeiðið og skeiðsleiðarunum, heili 10,3 í karakter eftir 13'skalanum.

**Málbólkur**
Størri og smærri fyritøkur, ið ynskja at fáa størri succes við at fáa útistandandi pening í hús.

**Brot úr skránni**
- Tryggja gott samskifti, soleiðis at kundin framvegis ynskir at verða kundi í fyritøkuni
- Loysir tað seg at biðja um ákonto gjald?
- Hvussu menna vit og seta í verk góðar, handilstreytir og kredittpolitik?
- Hvat er at gera, um skuldarin er ógjaldførur?
- Onnur tiltøk um kundin ikki rindar

Synergi - 32BELL (322355)
www.synergi.fo - synergi@synergi.fo
Synergi